# Námsfrøðiligt eftirlit

## Inngangur

Almanna- og mentamálaráðið bjóðar út uppgávuna at fremja námsfrøðiligt eftirlit við tilboðum og tænastum, sum verða veittar sambært kapittul 5 og 6 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur.

Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur setir kós fyri eina av týðandi súlunum undir føroyska vælferðarsamfelagnum.

Endamálið við lógini er at virka sum niðasta fíggjarliga trygdarnet hjá fólki, sum ikki megna at uppihalda sær sjálvum og sínum. Samstundis er endamálið at skapa karmar fyri, at fólk, sum hava tørv á sosialum tænastum, í størst møguligan mun gerast sjálvhjálpin.

Í lógini verður ásett, at borgarin skal takast uppá ráð, fáa skjóta og góða ráðgeving og í heila tikið stuðlast, so hann kann liva eitt so vanligt lív sum gjørligt. Dentur verður lagdur á tann fyribyrgjandi táttin, og at veitingar og tænastur skulu virka og eggja til størri sjálvhjálpni.

Hetta er við støði í teimum brekpolitiskum meginreglum um samhaldsfesti, javnviðgerð, kompensatión, geiraábyrgd og í ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

Lógin kom í staðin fyri gomlu forsorgarlógina, sum upprunaliga er ein donsk lóg frá 1960'unum.

## Uppgáva

Uppgávan, ið verður boðin út er, at fremja námsfrøðiligt eftirlit við tilboðum og tænastum, sum verða veittar sambært kapittul 5 og 6 í løgtingslóg í almannatrygd og tænastur. Talan er um eftirlit við áleið 15 tilboðum árliga. Eftirlitið verður framt við heimild í § 69, og eru nærri reglur ásettar í kunngerð nr. 226 frá 20. desember 2020 um  eftirlit.

Tað eru áleið 80 tilboð, ið verða veitt sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur, ið eru fevnd av námsfrøðiligum eftirliti. Hesi eru ymisk í vavi, og eru staðsett ymsa staðni í Føroyum. Tað er Almanna- og mentamálaráðið ið avgerð hvørji av hesum tilboðum eftirlitið skal fevna um á hvørjum ári.

Vísandi til heimild í rundskrivi landsins um keyp av vørum og tænastum verður ein trý ára sáttmáli um eftirlit bjóðaður út, við møguleika fyri at leingja sáttmálan.

## Innihald

Endamálið við eftirlitinum er at tryggja, at tilboð og tænastur virka sambært ætlan og virkisætlan, at búfólk og persónar, sum fáa tilboð og tænastur, trívast og mennast, at hølisviðurskifti eru hóskandi, og at fakliga støðið hjá starvsfólki er nøktandi.

Eftirlitið skal leggja dent á nøkur av teimum viðurskiftum, sum eru ásett í kunngerð nr. 226 frá 20. desember 2020 um námsfrøðiligt eftirlit, og verður eftirlitið fyrireikað við støði í hesum.

Evnini, ið ætlanin serliga er at leggja dent á hesaferð, eru, at tilboðini og tænastan virkar sambært ætlan og virkisætlan, sambært § 3, stk. 3 og § 33 í løgtingslógini, arbeiðshættir og háttalag, trivnaður og menning hjá borgarum, og fakliga støðið hjá starvsfólkum, harundir um nógv útskifting er í starvsfólkahópinum. Eftirlitið kann tó viðgera onnur evni, um hesi vísa seg at vera viðkomandi at taka við, tá ið eftirlitið verður framt.

Í sambandi við fyrireikingina, er Almanna- og mentamálaráðið kontaktpersónur hjá veitara í mun til at fáa innlit í hvørjar lógir og kunngerðir eru galdandi á økinum, eins og innlit í tilfar og frágreiðingar frá tí eftirliti, ið er framt undanfarnu ár, ið kann nýtast sum íblástur.

Almannaverkið útvegar tað tilfar, ið veitarin metir vera viðkomandi fyri at fremja eftirlitið, eitt nú virksemisætlanir, lýsing av tilboðunum, málbólkinum, normeringum og námsfrøðiligum arbeiðshættum, virðisgrundarlag, visitatiónstilfar, virksemisætlanir, fundarfrásagnir frá starvsfólkafundum.

Tá ið eftirlitið verður framt er umráðandi, at eftirlitsfólkið/ini vitja støðini, har tilboðini verða veitt, og har fáa innlit í ein gerandisdag, námsfrøðiligu arbeiðshættirnar og karmarnar á staðnum. Eisini er umráðandi, at eftirlitsfólkið/ini tosa við starvsfólkini og leiðsluna, og geva borgarum og teirra avvarðandi høvi at koma til orðanna. Møguleiki skal vera fyri, at borgarar eftir ynski kunnu fáa samrøðu við eftirlitsfólkið/ini í einrúmi um innihaldið og karmarnar fyri tilboðið.

## Tímatal, staður og tíðarætlan

Námsfrøðiliga eftirlitið skal fremjast við áleið 15 tilboðum árliga, og kunnu vera skipaði undir einari ella fleiri eindum hjá Almannaverkinum.

Sum høvuðsregla skal veitarin skriva eina eftirlitsfrágreiðing fyri hvørt tilboð, ið lýsir eftirlitið og tilmælir til tilboðið. Nærri kunning um hvørji tilboð eftirlitið fevnir um verður givin, tá ið avtala er gjørd við veitara. Eisini verður møguleiki fyri at síggja eftirlitsfrágreiðingar frá undanfarnu árum, ið kunnu nýtast sum íblástur.

Samlaða tíðarnýtslan verður mett at vera áleið 28 tímar pr. tilboð. Íroknað er fyrireiking, ferðing, fremjan av eftirlitum og skriva eftirlitsfrágreiðingarnar.

Uppskot til tíðarætlan fyri 2025:

- Juni — Avtala verður undirskrivað og fyrireikandi arbeiði verður framt
- September — Eftirlitið verður fráboðað og tilfar verður umbiðið
- Oktober — Eftirlitið verður framt
- Januar — Endaligar eftirlitsfrágreiðingar fyriliggja

## Ábyrgdarbýti og leistur

Sí fylgiskjal 1. Mannagongd fyri at fremja námsfrøðiliga eftirlitið, sambært kunngerð nr. 226 frá 20. desember 2020 um námsfrøðiligt eftirlit.

### Krøv

Tað er eitt krav, at tann, ið fremur eftirlitið hevur námsfrøði- ella læraraútbúgving við viðkomandi yvirbygnaði ella viðkomandi royndum. Viðkomandi yvirbygningur er til dømis cand.ped. ella cand.ped.psyk. Viðkomandi royndir eru til dømis, at veitarin hevur framt námsfrøðiligt eftirlit áður, ella hevur havt aðrar uppgávur, sum á ein ella annan hátt kunnu samanberast við hesa.

Tað er ein fyrimunur um veitarin hevur:

- Royndir við eftirlitsarbeiði
- Góðar samskiftisførleikar og skriviførleikar

- Góðar førleikar at arbeiða sjálvstøðugt
- Innlit í tilboð og tænastur, sum Almannaverkið veitir, og lóggávuna á økinum
- Evni til at síggja fyri sær loysnir í truplum støðum og at vísa á hvørjar batar kunnu fremjast

Persónur, sum starvast í Almannaverkinum ella á tilboðum, ið eru skipað sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur kann ikki fremja eftirlitið.

Bæði fyritøkur og einstaklingar við neyðugu fakligu førleikunum kunnu senda inn tilboð um at fremja eftirlitið. Er talan um fyritøku, ið velur at bjóða, skal fyritøkan hava ein navngivin persón, sum skal standa fyri eftirlitinum.

**Treytir**

Eftirlitið og eftirlitsfrágreiðingin skal fremjast á føroyskum máli, og tað skal vera gjørligt hjá borgarum, starvsfólkum og avvarðandi at samskifta á føroyskum, tá ið eftirlitið verður framt.

**Annað**

Gjørt verður vart við, at viðkomandi, sum Almanna- og mentamálaráðið ger avtalu við um at fremja eftirlitið, hevur tagnarskyldu eftir § 152 a í revsilógini. Viðgerðin av persónsupplýsingunum, ið veitarin fær atgongd til, skal vera í tráð við Dátuverndarlógina. Um veitarin ikki hevur nøktandi trygdarfyriskipanir at goyma dátur, kann vera møguligt at gera avtalu um hetta við Almanna- og mentamálaráðið.

**Tilboðið**

Tilboðið skal lýsa útbúgving, førleikar og viðkomandi royndir hjá veitara, hvussu veitarin ætlar at fremja eftirlitið og kostnaðin. Íroknað kostnaðin skal vera kostnaðurin fyri at fremja sjálvt eftirlitið, eins og kostnaður fyri praktisk viðurskifti, eitt nú leiga bil og ferðing.

Um veitarin hevur viðkomandi royndir, skal veitarin í stuttum lýsa eitt tílíkt arbeiði, ið viðkomandi hevur verið við til at fremja, og hvørjar royndir veitarin hevur fingið í hesum sambandi, sum kunnu nýtast til at fremja námsfrøðiliga eftirlitið.

**Tíðarfreistir og ábyrgd**

Tilboð skulu latast inn umvegis teldupostin: gjaldstovan@gjaldstovan.fo, í seinasta lagi fríggjadagin 23. mai 2025 kl. 15.00. Miðað verður eftir at hava sáttmála undirskrivaðan í juni.

Eru spurningar til útboðstilfarið og uppgávuna, ber til at venda sær til Ann Kristinu Svabo Simonsen við at senda teldupost til svabo@ammr.fo. Allir spurningar skulu sendast inn skrivliga innan fríggjadagin 16. mai 2025 kl. 15.00. Allir spurningar verða kunngjørdir dulnevndir á Keypsportalinum.

**Vekting og val av tilboði**

Innkomin tilboð, sum lúka minstu krøvini, verða vektað eftir prísi og førleikum. Prísur telur 50% og førleikar telja 50%.

Koma Almanna- og mentamálaráðið og tann, sum hevur besta tilboðið, ikki á mál við at gera sáttmála, tekur Almanna- og mentamálaráðið sær rætt til at taka tingingar upp við tann, sum stendur næstur í røðini.

Almanna- og mentamálaráðið tilskilar sær somuleiðis rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnum tilboðunum.

**Útrokningin fer fram á henda hátt**

Góðska
Førleikar, útbúgving og royndir hjá ráðgevum við líknandi uppgávum. Út frá eini samlaðari meting - út frá førleikum, útbúgving, royndum og onnur krøv vit seta í hesum útboð - verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal. Tá dómsnevndin metir um veitaran, verður hugt eftir innsenda tilfarinum. Hugt verður eftir hvussu veitarin fer at megna uppgávuna. Talan verður um eina kvalitativa meting av førleikum, soleiðis sum dómsnevndin metur um innkomna tilfarið.

Tímaprísur
Tilboðið við lægsta samlaða tímaprísi fær 50 stig.
Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:

Tilboð við lægsta tímaprísi/tímaprísi í tilboði x 50

Lægsti tímaprísurin í frymlinum kann aldrin verða lægri enn 500 kr., t.e. at bjóðar ein veitari tímaprís lægri enn 500 kr., verður tímaprísurin ásettur til 500 kr. í metingini.

**Dømi um útrokning**

Góðska
Tilboð 1: Hesin veitarin skorar lægst, tí ráðgevararnir hava fáar og ikki so relevantar royndir og førleikar, hava ikki relevanta útbúgving, og tí veitarin hevur uppskot til loysn sum hevur manglar. Hesin fær 20 stig.

Tilboð 2: Hesin veitarin skorar miðal, tí royndir, førleikar, útbúgving og uppskot til loysn er á einum miðalgóðum stigi. Hesin fær 35 stig.

Tilboð 3: Hesin veitarin skorar hægst, tí ráðgevararnir hava tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnir, útbúgvingina og og kann vísa á nógv viðkomandi. Hesin fær 50 stig.

Prísur
Tilboð 1: Tilboðið við lægsta miðaltímaprísi hjá veitaranum er 500 kr. Hetta gevur 50 stig.

Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 650 kr. Hetta gevur 500/650 x 50 = 38,5 stig

Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 800 kr. Hetta gevur 500/800 x 50 = 31,5 stig

Samlað meting
Tilboð 1: Førleikar 20 stig + miðaltímaprís 50 stig = samlað meting á 70 stig.

Tilboð 2: Førleikar 35 stig + miðaltímaprís 38,5 stig = samlað meting á 73,5 stig.

Tilboð 3: Førleikar 50 stig + miðaltímaprís 31,5 stig = samlað meting á 81,5 stig. Hesin veitarin gerst sostatt vinnari av útboðnum.

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.